# Limafundur mikudagin 29. januar 2025 kl. 19:00 í Høllini á Hálsi

Luttakandi:
Nicholas Satchwell, Ása á Neystabø, Gunn Ellefsen, Margrid Weihe (Kyndil), Fridi Magnussen, Mark Lausen-Marcher, Jógvan Emil Nielsen, Andrass Thomsen, Hallur Danielsen, Magnus Dansson Jacobsen, Karstin í Husinum, Christian Østergaard, Egin Danielsen (Stif), Sára Mrdalo, Dan Lamhauge, Sigrun Jónsveinsdóttir, Rudi Olsen, Malan Justinussen, Bára Mortensen (VB), Maibritt Johannessen, Eydun Mortensen, Annika Arge, Helena Kallsberg, Beinta Fossádal, Anna Dam, Petur Skeel Dahl, Alfred Jacobsen, Jógvan Olsen, Sólja Fríða Jóanisdóttir, Eyð Hansen, Bjørg Patursson, Tóra Seloy, Ann-Britt Mortensen (Tryggur ítróttur), Hans Andrias Dahl, Heini Poulsen Hellisdal

**Vælkomin og skrá, Andrass Thomsen**
Andrass Thomsen beyð vælkomin og greiddi frá skránni.

1. **Faroe Islands Handball Cup, Bára**

Var ikki umrøtt.

2. **Framløga um Tryggurítróttur (www.trygguritrottur.fo)**

- Ann-Britt F. Mortensen kunnar um ráðgevingina Tryggurítróttur

Ann-Britt legði fram um 'Tryggur ítróttar'. Hvussu tryggja vit at børn og ung skulu kenna seg trygg í felags- og ítróttalívi. Skotið varð upp, at feløgini gera leiðreglur at hava innanhýsis í felagnum.

Niðurstøða: Feløgini góvu framløguni og kunningini gætur.

**3.1. Uppskot um broyting í skipan av U8 kappingum, Mark Lausen-Marcher**

- Uppskot um at broyta tal av leikarum í U8 til 4 leikarar á gólvinum í senn.

Feløgini tóku væl ímóti uppskotinum.

**3.2. Uppskot um broytingar í reglum fyri steypakappingina hjá ungdómi, Mark Lausen-Marcher**

- Uppskot um, at lið úr sama felag, har tað er gjørligt í mun til styrkismetingina, ikki kunna bólkast saman í bólkaspælinum í steypakappingini

Feløgini høvdu ikki viðmerkingar til uppskotið.

**3.3 Uppskot um at strika millumumfar í steypakappingina, tá 8 ella færri lið luttaka.**

  - Fyri at viðgera hetta uppskotið skulu vit heita á øll feløgini um at eftirkanna, hvussu nógvir leikarar, ið tit hava í tykkara felag, ið bert spæla við U18 dreingjum

Kjakast var fyri og ímóti uppskotinum. Mark vísti á, at nógvir leikarar í U18 deildini spæla nógvar dystir, tá teir eisini spæla við 1. deild og SMS/Burn. Semja var ikki um uppskotið, tá nøkur eisini hildu at U18 spældu fáar dystir.

**3.4 Uppskot um hvussu leikarar kunnu flyta millum lið í steypakappingini hjá børnum.**


ATLANTIC AIRWAYS effo RINKA NAVIGARE VARÐIN SPORT 24 sms FAXE KONDI SELECT WENZEL.FO BURN

Kjakast var um uppskotið, semja um at HSF arbeiðir víðari við uppskotinum.

**4. Kunning frá Dómaranevndini um dómaraskeið, Jógvan Emil Nielsen**
Jógvan Emil legði fram um virksemi í Dómararnevndini:

- Bólka dómara í C-, B-, A-dómarar
- Allir ungir dómarar skulu ígjøgnum C-skeiðið fyri at kunna døma ungdómshondbólt.
- B-dómaraskeiðið skal standast um man skal døma U16, U18, 1. deild og 2. deild.
- A-dómarar kunnu døma SMS/Burn.

G-dómaraskeið verða hildin í Klaksvík, Runavík, Giljanesi og Argjum á vári 2025.

Eru í gongd við at gera føroyskt tilfar til skeiðini.

Niðurstøða: Feløgini góvu framløguni gætur.

Søljan viðmerkt, at tað kann vera trupult at finna dómarar til at døma teirra heimadystir, um tað er eitt krav at ein skal hava staðið C-dómaraprógv fyri at kunna døma.

Skotið var upp, at HSF setir dómarar til hálvfinalurnar í steypakappingini.

4.1. Fríði Magnussen (Neistin) skjeyt upp at feløgini í Havn sjálvi áseta dómarar í 1. deild. H71, Kyndil tóku undir við hesum

Semja um at HSF roynir leistin í februar 2025.

**5. Framløga hjá H71 um Evropa Cup luttøku, Anna Dam**
Andrass legði fyri og vísti á, at HSF ynskir at føroysku feløgini luttaka í Europeisku kappingunum. Føroyar hava 4 pláss hjá monnum og kvinnum.

Anna Dam (H71) greiddi frá, hvussu H71 hevur gjørt.

Ymiskt krøv frá EHF. Ikki so fíggjarliga krevjandi, sum nógv halda, 100.000 – 130.000 kr. fyri hvørt umfar. Verður viðmælt at spæla báðar dystirnar sama stað. Sponsorar kunnu hjálpa til. H71 til reiðar at vegleiða um onnur feløg hava tørv á hesum. Spælararnir sera glaðir fyri uppgávuna og møguleikan at ferðast út í Europa at spæla. Mark Lausen-Marcher viðmældi, at ein felag heldur spælir Europa Cup, heldur enn at fara á venjingarlegu, hetta í mun til tað fíggjarliga.

**Steypafinalur 2025, Andrass Thomsen og Nicholas Satchwell**
Nicholas greiddi frá um steypafinalublaðið – tað er týdningarmikið, at har er ein kontaktpersónur í hvørjum felagi og at freistirnar verða hildnar. Kunning er send út til feløgini.

Andrass greiddi frá um nýggju umstøðurnar við Tjarnir

- Harpiksreglur / harpiksrúm.
- Reglur viðv. skiftingarrúmum. (kontaktpersónar frá feløgunum í mun til skiftingarrúm)
- Sølubúðir til steypafinalurnar – Við Tjarnir selur bara tá tey vaksnu spæla. Teldupostur er sendur feløgunum, hvørt tey ynskja at hava sølubúð.

- Faxe Kondi er stuðul – ynskja at vørur verða keyptar frá PM.

Gunn greiddi frá, at HSF ger nógv fyri steypafinalurnar skulu halda áfram við at verða fólksligar. HSF fer at arbeiða fyri at feløgini hvør sær, kunnu koma at sita samlaði til dystirnar. HSF kemur ikki at hava nakað stuðlatiltak í sambandi við finalurnar.

Í mun til vaktarhald – HSF kemur at senda teldupost til feløgini, í mun til hvør ynskir at hava vaktarhaldið, feløgini kunnu hareftir venda aftur.

Hallur greiddi frá smáum broytingum í leiksskránni.

**Gallaveitsla 2025, Hallur Danielsen**
Hallur greiddi frá um gallaveistluna – StÍF kemur at hýsa í Bygdahúsinum á Strondum 17. mai 2025.

**Learnhandball, Andrass Thomsen**
Bleiv ikki viðgjørt.

**Setan av kropsligum- og mentalvenjara, Andrass Thomsen**
Andrass greiddi frá, at HSF ætlandi fer at seta ein kropsligan og ein mentalvenjara fulla tíð í starv. Hugsanin er, at hesir skulu samstarva við feløgini og verða knýttir til landsliðini.

Verða ætlandi settir í eitt royndartíðarskeið á 2 ár.

Talan er um tvey fokusøki hjá HSF seinastu árini. Umstøðurnar til fysiska venjing eru batnaðar kring landi. Mark hevur fingið afturmeldingar frá feløgunum í mun til teirra tørv til fysiska venjing. HSF hugsar at hetta kann verða eitt gott amboð til feløgini.

Somuleiðis síggja vit fleiri av okkara landsliðsleikarum uttanlands, hava tørv á stuðli og sparring í mun til fysiska venjing.

Andrass greiddi frá, at HSF eisini hevur havt fokus á tað mentala venjing til leikararnar.
Uppgávurnar hjá mentalvenjaranum eru m.a.:
- Verða ein partur av venjaraútbúgvningini.
- At dagføra føroyska leistin.
- Vera ein partur av landsliðunum (frá ungdómum til vaksin)
- Ráðgeva føroysku leikarunum í útlondunum, soleiðis at HSF kann hava eitt yvirlit yvir føroysku leikararnar í útlandinum.
    - Eisini galdandi fyri ung, sum eru á eftirskúla og ungdómsútbúgving.

Niðurstøða: Feløgini góvu framløguni gætur.

**Innkomin mál:**
- SÍF/Søljan

Atburður hjá venjarum. Uppliva at løntir venjarar í øðrum feløgum hava ringan atburð yvirfyri dómarum.

Viðmerking frá StÍF í mun til dómarar, sum ikki megna uppgávuna.
- Feløgini skulu verða betri at áseta dómarar, sum makta uppgávuna, sum eisini eru motiveraðir til uppgávuna.

Viðmerking til TK, at tað eru dómararnir, sum ikki síggja motiverðir út (klæðir).

Ljóðbrot hjá HSF skal sendast út aftur.

Uppskot frá KÍF, at feløgini innanhýsis stýra, at dómararnir ikki býta um uttan góðkenning frá felagnum.

Uppskot um U10/U12, at tað verða spældir 3 dystir til kappingar í mun til tveir, og ístaðin hava færri kappingar. Var umrøtt á fundinum – fyri og ímóti.

D16 – kappingin riggar ikki, munurin millum topp og botn er ov stórur. Uppskot at gera eitt endaspæl, umrøtt á fundinum – fyri og ímóti.

- Tjaldur
    - **Áðrenn fundin skulu vit heita á feløgini, ið ikki hava møtt til dystir í 1. deild hjá kvinnum, um at eftirkanna orsøkina til hetta**

Tjaldur greiddi frá, at hvussu feløg ikki møta til 1. deildardystir.

Kjakast var um hvussu 1. deild kann lyftast, semja var um at venda aftur til hetta seinni.

**Skuld hjá feløgnum til HSF, Andrass Thomsen**
Andrass vísti á, at skuldin hjá feløgunum til HSF var ov høg, og at feløgini mugu vera betri til at avgreiða síni viðurskifti.

HSF ynskir at feløgini hava goldið skuldina áðrenn næsta kappingarári byrjar.

**Samanumtøka, Andrass Thomsen**

**Fundarskrivari, Nicholas Satchwell**


ATLANTIC AIRWAYS effo RINKA NAVIGARE VARÐIN SPORT 24 sms FAXE KONDI SELECT WENZEL.FO BURN